Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

Dagfesting
26. oktober 2020

Okkara j.nr.

Málsviðgeri
BR

Tygara j.nr.

**Kunning um fakfelagsfrælsi**

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið virðir altjóða sáttmálar um fakfelagsfrælsi. Sambært Evropeiska mannarættindasáttmálanum grein 11, stk. 1 er rætturin at taka seg saman í fakfeløg serliga vardur, eins og hann eisini er tað í ILO sáttmálunum frá 1987 og 1998 um fakfelagsfrælsi.

Starvsfólk hava rætt til at skipa seg í fakfelag, men kunnu eisini velja ikki at vera limur í einum fakfelag. Hetta er ein spurningur arbeiðsgevarin ikki eigur at leggja seg út í.

Í teimum førum, tá arbeiðsgevarin flytur limagjald til fakfeløg av lønini hjá starvsfólkum, mælir Kommunala arbeiðsgevarafelagið til, at arbeiðsgevarin fær skrivliga váttan frá hvørjum einstøkum starvsfólki sær um, at tey ynskja, at limagjald verður flutt av lønini og hvat fakfelag starvsfólkið ynskir at verða limur í. Hjáløgd er dømi um, hvussu slík váttan kann síggja út.

Um starvsfólk ynskja at broyta limaskapin í fakfelag eigur nýggj váttan at verða útflýggjað til arbeiðsgevaran at skráseta fyrisitingarliga.

Um so er, at arbeiðsgevarin limar starvsfólk í ávís fakfeløg uttan at spyrja starvsfólkini eftir, kunnu starvsfólkini krevja endurgjald frá arbeiðsgevaranum.

Tann 26. oktober 2020

Kommunala Arbeiðsgevarafelagið

# Váttan av limagjaldi til fakfelag

Við hesum verður váttað, at limagjald til ___________________________________ verður flutt av lønini.

Ynski **ikki** at limagjald verður flutt av lønini _____ (set x)

Dagfesting ______________________

Undirskrift starvsfólk __________________________________